# MVG'ið á mjólk, breyð og olju

JÓGVAN OLSEN
Tórshavn

Skotið verður upp at avtaka mvg'ið á basalum nýtsluvørum - mjólk, breyð og tílíkum. Tað er eitt gott uppskot, men hevði hetta ikki verið betri: Vit varðveita mvg á mjólk og breyði, men koyra teir pengarnar í ein grunn. Úr tí grunninum verður goldið til tey, ið ikki hava ráð at keypa mjólk og breyð. Í fyrstu syftu støk foreldur, síðani onnur smábarnaforeldur og so víðari.

Hvør er munurin? Jú, lat okkum siga, at ein av fýra borgarum ikki hevur nóg væl ráð at keypa mjólk og breyð. Fer mvg'ið í ein grunn, sum ber pengarnar aftur til tey veikastu, fáa tey fýra ferðir meira, enn um mvg'ið bert verður avtikið.

Tað eigur sjálvsagt at vera ymiskt hvussu nógv, hvør einstakur fær. Eftir tørvi. Smábarnaforeldur kunnu nú leggja seg eftir at uppala børnini til góðar samfelagsborgarar, í staðin fyri at liggja svøvnleys av peningatroti.

Við hesum modellinum kann man fara longur enn, við fleiri fyrimunum: Í staðin fyri at avtaka mvg og avgjald á olju, fara teir pengarnir í tann sama grunnin. Tað verður so latið teimum, ið hava størstan trupulleika av oljukostnaðinum.

Her kemur enn ein fyrimunur. At avtaka mvg á olju, vildi stimbra orkunýtslu og CO2-útláti í mun til, um man varðveitir avgjaldið. Munurin hevði verið stórur, tí tað er ikki tey fátæku, sum brenna mest olju. Sostatt vildi avtøka av mvg'i á olju serliga merkt eina størri nýtslu hjá teimum, sum ikki hava veruligan trupulleika av oljuprísinum.

Tað er rætt at laga avgjaldspolitikk, so hann ikki er til skaða fyri tey veikastu, men tað er ikki rætt at stimbra eina skaðiliga nýtslu gjøgnum hesa tillaging. Serliga ikki, tá tað fær verið øðrvísi.

# Trítornað misskilt nationalisma forðar skilagóðum ES-politikki



EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður

**Nýggja ES-kósin hjá landsstýrinum er eitt positivt tekin, men enn vil Landsstýrið ikki ásanna, at Ríkisfelagsskapin man vera besti trumfurin í tilgongdini at knýta Føroyar tættari at Europasamveldinum. Misskilta nationalisman, sum er ráðandi í fleiri politiskum viðurskiftum hjá Landsstýrinum, er høvuðsforðingin**

Misskilta nationalisman í Landsstýrinum forðar fyri, at vit í Føroyum kunnu bera okkum skilagott at í fleiri sera týðandi politiskum málum.

Hetta hava vit sæð fleiri ferðir, síðani CHE-samgongan skipaði landsstýri eftir nýggjár.

Fyrsta dømi var tann sera vandamikla ætlanin um at yvirtaka Fíggjareftirlitið og harvið seta samlaðu innlánini í føroyskum bankum í vanda.

Nú síggja vit enn eitt dømi.

Misskilta nationalisman er nú vorðin ein forðing fyri, at Føroyar trygt og væl kunnu fáa eitt tættari tilknýti til Europasamveldið.

**Skilagóð nýggj kós**
Landsstýrið boðaði tann 23. juni alment frá, at ein nýggjur Europapolitikkur er settur í verk.

Nú er málið um at fáa EFTA-limaskap sett í bakgrundina. Í staðin skal roynast at knýta Føroyar tættari at Europasamveldinum.

Hetta høvuðsskiftið í Europapolitikkinum tekur Sambandsflokkurin fult undir við. Flokkurin hevur í áravís verið forsprákari fyri, at Landsstýrið skal kannað treytirnar fyri, at Føroyar kunnu fáa eitt nógv tættari tilknýtið til ES. Hetta tilknýti vil uttan iva geva Føroyum atgongd til fleiri inntøkukeldur og framgongd á nógvum økjum.

Í Sambandsflokkinum hava vit undirstrikað, at vit mugu kanna, um og hvussu tað ber til at vinna Føroyum ES-limaskap við undantøkum, sum kunnu verja okkara fiskivinnuáhugamál..

Tí kunnu vit í flokkinum ikki annað enn fegnast um, at landsstýrisflokkarnir loksins taka undir við høvuðssjónarmiði Sambandsfloksins um Europapolitikkin.

**Sjálvmál alt fyri eitt**
Hóast høvuðsmálið í ES-politikkinum hjá Landsstýrinum soleiðis er vorðið positivt, gjørdist beinanvegin tann 23. juni greitt, at mátin, sum Landsstýrið vil nærkast Europasamveldinum, er púra galin.

Landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum boðaði henda dag í Útvarpinum frá, at "vit eiga at gagnnýta okkara sambond við Norðurlond, Bretland og kanska eisini baltisku londini, so vit kunnu fáa eina skjóta loysn".

Hetta ljóðar tilforlátiligt, men í grundini er hetta eitt politiskt sjálvmál av teimum stóru.

Orðaljóðið boðar týðiliga og greitt frá, at Landsstýrið vil ikki gera tað mest upplagda og náttúrliga – nevniliga at heita á ES-limalandið og ríkisfelagsskapslandið Danmark um at brúka sína stóru ávirkan í ES til tess at vinna Føroyum tættari tilknýti til Samveldið.

**Misskilt nationalisma**
Framman undan Ríkisfundinum í Føroyum tann 25. juni segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, at Danmark er til reiðar at rætta Føroyum eina hjálpandi hond at nærkast ES, um Landsstýrið kemur við einari áheitan um tað.

Hetta má metast at vera eitt áhugavert tilboð, tá hugsað verður um, at danski stjórnarleiðarin hevur eitt gott netverk og stóra ávirkan í ES.

Men hvat ger landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum? Jú, hann vil hava Baltalond at arbeiða fyri okkara søk. Vit mugu fyri alt í verðini ikki fáa donsku stjórnina at brúka síni góðu ES-sambond.

Hetta er trítornað misskilt nationalisma!

**Landsstýrið velur trupla og seina tilgongd**
Misskilta nationalisman, sum nevndi landsstýrismaður er eksponentur fyri, ber í sær, Føroyar verða sendar inn á eina kós, har tað verður trupult og helst eisini sera drúgt at vinna neyðugar sømdir í ES.

Áður hava vit sæð, at lond hava stríðst í 10-15 ár fyri at fáa limaskap í ES, og tað er ikki hetta, Føroyar hava brúk fyri.

Hyggjuráðini eru, at vit í staðin gera tað náttúrliga og tala væl saman við okkara góða samstarvsfelaga í Ríkisfelagsskapinum, Danmark. Saman ber til at leggja eina góða og trygga ætlan fyri, hvussu vit skjótt og væl kunnu nærkast Europasamveldinum.

Tað fyrsta, sum krevst, er, at Landsstýrið leggur misskiltu nationalismuna til viks og veruliga byrjar at hugsa skilagott á uttanlandspolitiska økinum.

# Fullveldisheilivágur er bíligari og E elski Føroyar



KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin

Tað er ikki serliga hugaligt at sita og eygleiða eina samgongu sum ikki er arbeiðsfør, og sum enn ikki hevur torað at sett kós. Hetta er ein vanlukkulig støða fyri landið. Hetta kemur at kosta í vælferð og tryggleika, eingin ivi um tað, men vit standa spyrjandi, hvat vil "CHE" samgongan á heilsuøkinum?

Teir tríggir samgonguflokkarnir fóru til val uppá at styrkja tey bleytu virðini, vælvitandi um at sjúkrahúsverkið er tann sjálvsagda kjarnan, tá talan er um persónliga trygd hjá bæði føroyingum og útlendingum, men nú beint undan Ólavsøku, fáa vit at vita, at heilivágur skal skerjast og bíðilistarnir skulu økjast. Hetta er dýrasta loysnin fyri eitt og hvørt sjúkrahús og kann ikki gjøgnumførast sum støðan er.

Hvør varðar av sjúkrahúsinum, nú bæði løgmaður og landstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum eru settir til viks? Hvør stýrir, hvør raðfestir og hvør hevur nú veruligu ábyrgdina innan sjúkrahúsverkið? Veit væl at landstýrismaðurin er sera ónøgdur við at verða kveistraður til viks, men tann í tegir hann samtykkir og hevur landstýrismaðurin sostatt framhaldandi ábyrgdina av óskilinum og ørskapinum, sum nú er við at henda innan okkara sjúkrahúsverk.

Tá álitið á eina politiska leiðslu er fokið, er vanligt at seta eina politiska sokallaða skjóttarbeiðandi nevnd at útgreina hvar skipið er statt og hvør tann nýggja kósin er, sum setast skal, men her er ruðuleikin størri enn nakrantið, tí fíggjarmálaráðið skal seta nevndina at arbeiða, í verðuleikanum uttanum landstýrismannin í almanna- og heilsumálum.

Tær staðbundnu Sjúkrahúsleiðslurnar vita ikki síni livandi ráð orsakað av manglandi ella skeivari politiskari leiðslu omanfyri.

Sjálvandi mangla 2,6 mia kr. í síðani 2002 og sjálvandi gongur tað út yvir tey veiku í samfelagnum, men at eingin í samgonguni tekur stykkið út og steðgar ørskapinum, skilja bert tey fáu.

Landstýrismaðurin hevur fingið eitt reytt kort frá sínum egnu, men at leiðandi politikarar leggja eftir sjúkrahúsleiðsluni er "unfair". Starvsfólk og leiðsla á sjúkrahúsinum gerða eitt gott arbeiði, lat ongan iva verða um tað.

Men tann fløvandi hondin, og tað sakliga uppbyggjandi kjakið frá okkum politikarum, hevur verði undir alt lágmark og slettis ikki nøktandi. Har hava vit eisini eina stóra ábyrgd sum fólkavald umboð hvat vit borðreiða við á tingsins røðarapalli, tá talan er um hvussu vit gerða okkara sjúkrahúsverk enn betri.

Sum eitt kuriosum kom eg at hugsa um, at meðan annar tann føroyski fólkatingsmaðurin arbeiðir fyri at vinna føroyingum størri møguleikar og betri sømdir fyri at gjalda okkara sjúkrahúsverk, so spælir hin evnaríki skemtarin og fólkatingsmaðurin sum skuldi arbeiða sum fólkatingsmaður burturav, partapolitiskar filmar og partapolitiskar kabarettir, undir partapolitiska heitinum "E elski Førjar".

Føroyar hava brúk fyri báðum, og persónliga vil eg siga at "EG elski Føroyar og B elskar eisini Føroyar, og í staðin fyri at leita eftir "innara jeikaranum", so skuldu vit møguliga í staðin fara at leita eftir, hvar samgongan bleiv av og hvør tann innara meiningin hjá samgonguni við sjúkrahúsinum er.

# Bíblian innblást av Gudi – ikki mannaorð um Gud



RICHARD DANIELSEN

**Tríatiundi partur.**

Haggai profetur profeteraði eftir útlegdirnar. Hinir profetarnir høvdu sagt, at fólkið skuldi fara í úlegd til allar tjóðir. Hetta hendi tó ikki beinanveg. Juda, sunnari parturin, kom heim aftur til landið, tá ið sjeyti ár vóru farin. Hetta hevði við eitt lyfti at gera, sum Harrin hevði lovað við Jeremiasi. Fyrst er at siga her, at Gud við Mósesi hevði givið boð um, at jørðin hjá ísraelsmonnum skuldi hvíla og ikki verða dyrka sjeynda hvørt ár, eitt so kalla sabbatsár. Ísraelsmenn høvdu ikki hildið boðið, og tí skuldi jørðin hava frið á annan hátt, og tað gjørdi Gud, tá ið hann lat bábelskong reka ísraelsfólk úr landinum. Longu í triðju Mósebók stendur hetta:

Tá skal landið fáa sabbatsár síni aftur - alla ta tíð tað liggur oyðið, meðan tit eru í landi fíggindans - ja, tá skal landið hvíla og fáa sabbatsár síni aftur! 26,34.

Lyftið við Jeremiasi ljóðar soleiðis:

Tí so sigur HARRIN: Táið 70 ár eru umliðin fyri Bábel, skal Eg vitja tykkum og uppfylla tykkum tað góða, ið Eg havi talað, at Eg skal lata tykkum koma aftur higar.

Og Harrin útførdi lyftið við Kýrus persarakongi, sum legði bábelsríki undir seg.

Men fyrsta árið ið Kýrus kongur í Persia sat við stýrið, vakti HARRIN - fyri at orð Hansara, sum Jeremias hevði talað, skuldu ganga út - anda Kýrusar persarakongs, so at hann læt boð ganga út um alt ríki sítt og eisini skrivliga kunngera:

"So sigur Kýrus kongur í Persia: HARRIN Gud Himmalsins hevur givið mær øll ríki á jørðini, og Hann hevur álagt mær at byggja Sær hús í Jerúsalem í Juda. Hvør tann av tykkum, ið hoyrir til fólk Hansara, við honum veri HARRIN Gud hansara, hann kann fara hagar!" 2. Krøn. 36, 22-23

Soleiðis hendi tað, at Judamenn komu heim aftur til landið. Teir blivu tó ikki eitt kongaríki aftur, men stóðu nú undir teimum heidnu kongunum. Til seinast, áðrenn teir vóru riknir út um alla jørðina, stóðu teir, sum kunnugt, undir rómverjaríkinum.

Ezra bók sigur frá um, tá ið Judamenn fóru heimaftur, og um tá ið templið varð bygt, og Nehemiasar bók sigur frá um, tá ið múrarnir vóru reistir aftur um Jerúsalem. Í báðum førum stóðu fíggindar Guds í móti teimum, og royndu at forða arbeiðnum. Teir kendastu mennirnir frá hesi tíðini í Juda søgu eru Ezra, Nehemias, Josva presturin, Zerubbabel landshøvdingin og Haggai og Zacharias profetarnir.

Fíggindarnir stóðu, sum sagt, ímóti, og teimum lukkaist at steðga arbeiðnum. Tá er tað, Haggai og Zacharias eggja til at seta arbeiðið ígongd aftur, og tað bleiv gjørt. Hesa ferð fingu hinir ikki steðga arbeiðnum, og templið bleiv reist av nýggjum. Teir byrjaðu aftur eftir steðgin, annað árið ið Darius var kongur, og fýra ár seinni stóð templið liðugt.

Framhald.